UTTAN ÚR HEIMI

# Einki loysigjald

*Amerikanska stjórnin hevur boðað frá, at hon fer ikki at rinda loysigjald fyri trygdarmannin Ronald Schulz, sum er burturfluttur í Irak. Burturflytararnir góvu USA 48 tímar til at lata allar irakskar fangar leysar. Verður tað ikki gjørt, verður Ronald Schulz tikin av døgum. Men George W. Bush, forseti, sigur, at USA slakar ikki.*




# Eitt stórt mistak

**-Noreg gjørdi eitt stórt mistak at selja Ísrael tungt vatn, sigur ísraelski kjarnorkuteknikarin Moredechai Vanunu.**



*Mordechai Vanunu*

KJARNORKA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Í 1986 avdúkaði Mordechai Vanunu partar av tí loyniliga ísraelska kjarnorkuútbúnaðinum, og tað kostaði honum átjan ár í fongsli. Men nú eins og tá heldur hann, at Ísrael skuldi ongantíð havt útvegað sær kjarnorkuvápn, og at tað var eitt mistak av Noregi at hjálpa landinum við tí.

-Tað var eitt stórt mistak, sigur Mordechai Vanunu við Aftenposten.

Í 1959 fekk Ísrael tungt vatn úr Noregi, og tað gjørdi tað møguligt hjá ísraelsmonnum at gera kjarnorkuvápn. Norska útvarpið hevur avdúkað, at stjórnin í Oslo visti, hvat vatnið skuldi brúkast til, sjálvt um norskir politikarar hava avsannað tað í mong ár. Mordechai Vanunu, sum sjálvur arbeiddi á kjarnorkuverkinum Dimona, er eisini sannførdur um, at norðmenn vóru vitandi um ísraelsku kjarnorkuætlaninar.

-Norðmenn vistu, hvat ísraelsmenn fingust við, og teir vistu, at tað tunga vatnið skuldi brúkast til kjarnorkuvápn. Avgerðin hjá norsku stjórnini var eitt stórt mistak, sigur Vanunu.

Í fjør slapp hann úr fongslinum eftir at hava sitið tey átjan árini handan rimarnar. Men hann sleppur ikki úr Ísrael, og hann sleppur ikki at tosa við tíðindafólk. Fyrrverandi norski forsætisráðharrin Kåre Willoch heldur, at Vanunu eigur at fáa friðskjól í Noregi.

-Vit vóru við til at seta hann í eina moralska tvístøðu, sigur Willoch.

# „Titanic“ sakk skjótari enn higartil hildið

**Granskarar halda seg hava funnið tekin um, at tað stóra ferðamannaskipið sakk nógv skjótari, enn fólk higartil hava hildið**

VANLUKKA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tvey petti av botninum á „Titanic“ benda sambært serfrøðingum á, at tað stóra ferðamannaskipið sakk nógv skjótari enn higartil hildið.

Í 1985 varð vrakið av „Titanic“ funnið á botni í Atlantshavinum, men hesi bæði pettini vórðu ikki funnin tá. Roger Long, sum hevur kannað tey bæði pettini, sigur við sjónvarpið CNN, at botnurin fór undan skipinum, tá tað rendi á ísfjallið, og at forskipið brotnaði frá afturskipinum. Forskipið sakk beinanvegin, og fimm minuttir seinni sakk hin parturin, sigur hann.

Fyrr hava serkøn hildið, at afturskipið fleyt einar tjúgu minuttir, og soleiðis var eisini í filminum „Titanic“ frá 1997.

David Brown, sum er serkønur í viðurskiftunum í sambandi við „Titanic“, sigur við CNN, at tann nýggja metingin er helst røtt.

„Titanic“ sakk á teirri fyrstu ferðini um Atlantshavið tann 14. apríl í 1912. Vanlukkan kostaði 1500 mannalív.

## Skuldsettur fyri neyðtøku

Jacob Zuma, sum herfyri varð loystur úr starvinum sum varaforseti í Suðurafrika, er nú skuldsettur fyri neyðtøku. Í rættinum í Johannesburg fyrradagin noktaði hann seg sekan og varð latin leysur ímóti 20.000 krónum í veðhaldi.

Zuma og stuðlar hansara halda uppá, at endamálið við skuldsetingini er politiskt og ein roynd at spilla hann út, so hann skal missa møguleikan at taka við forsetaembætinum eftir Thabo Mbeki, forseta, sum fer frá í 2009. Framman undan skuldsetingini varð Zuma roknaður sum næsti maður í stjórnarflokkinum ANC, og hann er eisini nógv avhildin í teimum suðurafrikonsku fakfeløgunum.

Fyrr í ár bleiv Jacon Zuma koyrdur úr stjórnini, eftir at ákæruvaldið skuldsetti hann fyri svik í einum máli, sum snýr seg um vápnahandil. Ein av hjálparmonnum hansara og tvær franskar vápnaverksmiðjur eru skuldsettar í sama máli.

## Tey veiku havatað verri

Ein kanning hjá danska almannamálaráðnum vísir, at umstøðurnar hjá heimleysum, einligum mammum, sinnisveikum og misbrúkarum í Danmark eru versnaðar tey seinastu fýra árini.

Í kanningini hevur almannamálaráðið spurt seg fyri hjá 32 felagsskapum, sum dagliga hava við teuy veiku í samfelagnum at gera, og 68 prosent av teimum spurdu siga, at umstøðurnar eru versnaðar. Serliga tey heimleysu og tær einligu mammurnar hava tað truplari nú enn fyri fýra árum síðani.

Bjarne Lennau í Kirkens Korshær sigur við Politiken, at sum heild eru viðurskiftini versnað, og tað sama sigur Joan Munch hjá danska Frelsunarherinum. Hon sigur, at nú eru tað fleiri, sum spyrja eftir hjálp, tí tey hava ikki pengar til mat.

Men tey illa støddu fáa eftir øllum at døma ikki meiri hjálp frá tí almenna. Eva Kjer Hansen, almannamálaráðharri, sigur við Politiken, at stjórnin fer ikki at játta meiri pengar.

## Funnu nýtt rovdjór

Granskarar hjá heimsnáttúrustovninum World Wildlife Foundation halda seg vera komnar fram á eitt higartil ókent rovdjór á indonesisku oynni Borneo.

Granskararnir siga, at djórið hevur reytt skinn, langan hala og minnir um bæði kettu og rev. Tær fyrstu myndirnar av djórinum benda á, at tað er eitt sindur størri enn ein vanlig ketta.

Tey seinastu tíggju árini hava granskararfunnið fleiri higartil ókend plantu- og skriðdjórasløg á Borneo, men sambært WWF er hetta fyrstu ferð í meiri enn hundrað ár, at vísindin hevur funnið eitt ókent súgdjór á oynni. Tí er veruliga talan um eina stórhending, sigur norski WWF-granskarin Andreas Tveteraas við Dagsavisen.

## Hann doyði av blýeitran

Herfyri kom skølturin av heimskenda tónasmiðinum Ludwig van Beethoven undan kavi, og í seinastuni hava granskarar á einum stovni í Chicago roynt at kanna, um skølturin kann siga nakað um, hví Beethoven doyði bara 56 ára gamal í 1827.

Tað hevur leingi verið gitt, at Beethoven leið av blýeitran, og Bill Walsh, granskari í Chicago, sigur við tíðindastovuna AP, at kanningarnar har vísa týðiliga, at nógv blýggj er í skøltinum. Bill Walsh vísir á, at sambært skrivaðum keldum leið Beethoven av magapínu á ungum árum, og at tað samsvarar væl við, at hann kann hava liðið av býeitran.

Summir tónleikasøgumenn halda, at Beethoven kann hava fingið blýeitran, tí hann plagdi at drekka vín úr blíbikari. Onnur halda, at hann fekk ymisk evni við blýggi í frá læknunum, sum royndu at linna magapínu hansara.